## DAGSINS MEINING

# Trygdin

Landsstýrið hevur reist spurningin um trygd Føroya og um hvussuleiðis løgting og landsstýri kunnu fáa størri ávirkan á trygdarspurningin. Tað, at landsstýrið reisir hendan spurning nú, er í sjálvum sær áhugavert. Higartil hevur tað nevniliga verið so, at hvørja ferð spurningurin um støðu Føroya við atliti at verju- og trygdarspurningum hevur verið reistur, er hetta komið so at siga uttaneftir. Føroyskir myndugleikar hava áður ikki reist hetta mál av sínum eintingum. Verju- og hernaðarspnuringar hava verið nakað, sum ein helst ikki hevur viljað umrøtt, men sum løgting og landstýri hava tikið støðu til, tá hesir myndugleikar hava verið noyddir til tað.

Henda støða er vælskiljandi, tí føroyingar hava langa siðvenju fyri at vera uttanveltaðir. Í hesum líkjast vit meira okkara svensku ættfrændum enn t.d.norðmonnum og dønum. Hvør orsøkin til hesa siðvenju er, vita vit ikki við við vissu, men ein hevur tó loyvi at halda, at hetta hevur nakað at gera við okkara søguligu royndir gjøgnum øldir. Eisini hevur hetta kanska nakað at gera við, at føroyingar flestir halda, at tað er ikki uttan vanda at leggja seg út í ósemjur millum stórveldi. Føroyingar søgdu sum teir gomlu kinverjarnir: "Tá elefantarnir berjast verður grasið leksað niður." Tað hevur um hesa støðu verið ein sjaldsama stór og breið semja á tingi og millum manna. Sjálvt meðan Kalda kríggið leikaði í uppá tað harðasta, hoyrdist ikki ein rødd um, at vit skuldu fara aktivt upp í NATO. Hvørja ferð danir royndu at leggja okkum undir verjuskyldu, søgdu vit nei og hetta gongur heilt aftur til gamlar dagar.

Síðan Kalda Kríggið helt uppat er støðan so broytt. Og tað løgna er hent, at so hvørt sum NATO hevur havt lyndi til at avvikla sítt virksemi um okkara leiðir, er áhugin millum føroyskar politiskar flokkar vaksin fyri eini meira virknari føroyskari luttøku í verju- og NATO málinum. Hetta kann stava frá tí broyttu støðuni í heiminum, har tað í dag bert er eitt stórveldi eftir á heimspolitiska leikvøllinum. Nú er verju-og trygdarspuringurin so reistur av álvara og løgtingið fær høvið til at umrøða og taka støðu til henda sera stóra spurning. Vónandi fara tingmenn at viðgera hetta mál við tí álvarsemi og nærlagni, sum hetta mál hevur uppiborið. Vónandi fáa vit eitt sakligt alment orðaskifti millum manna í fjølmiðlunum, so tað veruliga fer at bera til at staðfesta, hvørja støðu føroyingar hava til trygdarspurningin. Vit fara at venda aftur til ítøkiliga uppskotið frá landsstýrinum, tá hetta kemur til viðgerðar á tingi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Saga greinina av sum øll fiskivinnan hvílir á I

**Heini O. Heinesen**



Soleiðis sum Fiskimálastýrið við sínum landsstýrismanni, hevur umsitið lógina um vinnuligan fiskiskap seinastu 8 árini, er ongin ivi í mínari verð, at teir eru í ferð við at saga greinina av, sum øll fiskivinnana hvílir á. Hetta havi eg so mangan víst á, bæði í skrift og talu.

Fiskiloyvið til gomlu Ágot er bara eitt gott dømi um, hvussu ymiskt umsóknirnar hava verið viðgjørdar av stýrinum, serliga upp undir val. Er hetta politiskt mutur ella hvat?

Tá Jákup Mikkelsen leggur landsstýrismannanevndina undir at hava viðgjørt hetta mál politiskt uttan at hava eitt einasta prógv fyri hesum, fari eg í hvussu so er ikki at lata slíkt fara óátalað aftur við borðinum. Hann tók sjálvur sum limur í nevndini undir við niðurstøðuni hjá skrivarnum, sum er ein dugnaligur og arbeiðssamur løgfrøðingur við góðum innliti í lógina, og hevur verið skrivari í vinnunevndini í mong ár.

Tann einasti nevndarlimurin sum hevði ein politiskan trupulleika at viðgera tað ávísa málið varð Jákup Mikkelsen sjálvur. Hetta komst av, at fiskiloyvið til gomlu »Ågot« varð útskrivað av einum fólkaflokslandsstýrismanni dagin fyri valið 30. apríl 2002 aftan á eina panikviðgerð í fiskimálastýrinum.

Upprunin til sjálvt málið um gomlu Ågot, var ein kæra frá »Felagnum Líniskip« 3. mars 2003. *Í **kæruni** verður heitt á landsstýrismálanevndia um at kanna, á hvørjum grundarlagi veiði- og fiskiloyvi er útskrivað hesum fiskifarið, sum er farið úr flotanum fyri nýggju Ågot.*

***Endaliga niðurstøða landsstýrismálanevndarinnar er sostatt, at avgerðin hjá Fiskimálaráðnum at geva Sp/f Nakki, Klaksvík, tilsøgn um, at loyvini hjá Skørini og Barininum kundu flytast á Ågot I, var ólóglig.***

*Grundgevingin fyri niðurstøðu nevndarinnar er, at atlitini, ið lógu til grund fyri avgerðini, vóru ósaklig.*

*Landsstýrismálanevndin grundar sínar niðurstøður á frágreiðing hjá skrivarnum í landsstýrimálanevndini, sum tí er hjáløgd. Nevndin tekur í síni heild undir við frágreiðingini. Í frágreiðingini eru aðrar niðurstøður, ið hava týdning fyri málið, men sum ikki eru endurgivnar her, við tað at at tær ikki eru beinleiðis fevndar av kærusetninginum.*

*Tað er hereftir upp til landsstýrismannin í fiskivinnumálum, løgmann ella løgtingið at taka støðu til møguligar fyrisitingarligar, politiskar og rættarligar avleiðingar av frágreiðingini og niðurstøðum landsstýrismálanevndarinnar.*

*Umframt felagið Línuskip, eru landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, løgmaður og allir tingmenn kunnaðir un niðurstøðu landstýrismálanevndirinna , jbr. starvsskipan nevndarinnar § 8.*

Landsstýrismálanevndin hevur í hvussu er, ikki álagt landsstýrismanninum í fiskivinnumálum at taka veiðu- og fiskiloyvi aftur frá gomlu Ågot, sum bindandi tilsøgn var givin til dagin fyri valið 30. apríl 2002. Skaðin er longu tá hendir.

Hetta letur seg heldur ikki gera, tí landsstýrismaðurin situr við fullari ábyrgd fyri sínum málsøki. At Fiskimálastýrið so biðir felagið um at stevna stýrinum, má verða størsta vanviðring av Føroya løgtingi í søguni.

Landsstýrismálanevndin hevur gjørt niðurstøður í fleiri málum, uttan at viðkomandi landsstýrismaður hevur tikið málið aftur, í flestu førum er tað ikki møguligt.

Tað kann undir ongum umstøðum verða borgarin, sum skal svíða fyri at ein landsstýrismaður ikki umsitir í trá við lógina.

**Broytir ikki niðurstøðuna hjá landsstýrismálnevndini:**

Eg havi nú lisið dómin, sum er avsagdur í Føroya Rætti. Har er í hvussu er ikki nakað nýtt, sum eg ikki visti framanundan.

Hetta broytir ikki niðurstøðuna hjá landsstýrismálanevndini. Um vit nú skulu brúka hetta málið sum fyrimynd til at umsita lógina um vinnuligan fiskiskap, er hetta tað sama sum at forkoma allari føroyskari fiskivinnu í framtíðini.

At Jákup Mikkelsen og Óli Brekkman nú skjóta upp at avtakað landsstýris málanevndina, sigur mær so mikið, at arbeiðið hjá nevndini er góðari leið.

**Taka grundarlagið undan verandi línuskipa - og úróðrarflota:**

• Lógin um vinnuligan fiskiskap eigur at tryggja at allir veiðubólkar sum eru nevndir í lógini hava somu rættindi. Tí eigur útróðarar-flotin ikki at verður gjørdir um til línuskip, hetta kemur at økja munandi um veiðutrýstið, serliga á tosk og hýsu. Hetta kemur eisini at taka grundarlagi undan verandi línuskipaflota, um tey vera fleiri í tali. Herafturat kemur at tann havgangandi útróðrarflotin sum vit kenna hann í dag, kemur at hvørva.

• § 5. stk. 12. í lógini um vinnuligan fiskiskap tryggjar at línuskip yvir 110 tons í bólki 3: **ikki** kunnu flytast í bólk 4:

• ***Stk. 12. sigur: Tons merkt Tonsatal brutto (BT) ella Skrásett Brutto Tons (BRT) sum til eina og hvørja tíð tilskila á skipsins málibrævi ella máliprógvi. Fiskifør kunnu ikki skifta høvuðsbólk sambært § 28, stk. 1, aftaná at henda ásetting hevur fingi gildi.*** (seinast broytt 1998 lóg nr. 69)

• Sambært lógina um vinnuliga fiskiskap § 8 stk. 3. kunnu bert tvey uppruna-loyvir leggjast saman til eitt loyvi. Hetta skuldi gjørt at tað ikki bar til at faa nýggj línuskipaloyvir við at leggja tveir útróðrarbátar saman, uttan so at lógin verður brotin.

• ***§ 28. í lógini skuldi eisini tryggja at hetta ikki var møguligt uttan at fremja lógarbrot. Sitat úr lógini:***

• ***§ 28. Veiðiflotin verður býttur upp í hesar høvuðsbólkar av fiskiførum á føroysku landleiðunum:***

• ***Bólkur 1: Trolarar yvir 400 HK, lemmatrolarar.***

• ***Bólkur 2: Trolarar yvir 400 Hk, pør.***

• ***Bólkur 3: Líniskip yvir 110 tons.***

• ***Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 15 tons.***

• ***Bólkur 5: Útróðrarbátar undi 15 tons á húkaveiði.***

• ***Stk. 2. Rætturin til tilfeingi á landleiðini verður roknað hvørjum høvuðsbólki sær eftir prosentbýti. Toskur Hýsa Upsi Kongafiskur***

• ***Bólkur 1: Lemmatrolara yvir 400 HK. 4% 1,75% 13% 90,5%***

• ***Bólkur 2: Trolara, pør yvir 400HK. 21% 10,25% 69% 8,5%***

• ***Bólkur 3: Línuskip yvir 110 tons. 23% 28%***

*Framhald á síðu 11*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Nakrir tankar um "Jósef"

**Símun Absalonsen**



Eini 7.000 fólk vitjaðu Norðurlandahúsið í samband við sangleikin "Jósef", og fjølmiðlarnir hava verið á tremur við rósandi orðum um tiltakið. At almenningurin sýndi "Jósef" slíkan áhuga er ein viðurkenning í sjálvum sær. Teir nærum tveir tímarnir ið leikurin vardi gingu fyri mítt viðkomandi skjótt og upplivingin var ógloymandi.

Um leikin sjálvan ætli eg mær ikki at gera stórvegis viðmerkingar, til tað hava eg ov lítið skil fyri leiklistini. Hinvegin kundi eg hugsa mær at hugleitt eitt sindur um søguna um Jósef.

### Søga ella saga

Frásøgnin um Jósef er sum kunnugt tikin úr Bibliuni og verður ofta nýtt sum eitt skúladømi um styrkina í fyrigeving, tá ilt verður lønt við góðum. Hetta tykist at vera lærdómurin í søguni um Jósef, og fyri mong hevur tað kanska minni at týða, hvørt søgan er sonn, partvíst sonn, ella kanska bert eitt hugtakandi ævintýr.

Sjálvur havi eg ongantíð verið í iva um at søgan er sonn og at talan er um meira enn eina søgu. Jósef livdi um ár 1.700 f. Kr. og lívssøga hansara er, umframt at vera sera spennandi, harumframt eisini bæði profetisk og Messiansk.

Biblian er altíð tvíeggjað og hetta gevur ein sær ikki altíð fær um tá lisið verður. Úr ymiskum lívssøgum í gamla testamenti finna vit ymiskar Messiasmyndir sum t.d. í lívssøguni hjá Móses, Dávid ella patriarkunum. Men eingin lívssøga í bibliuni hevur so fjøltáttaðar og sterkar Messiasmyndir sum lívssøga Jósefs. Granskarar hava mangan staðið undrandi, tá teir hava samanborið lívssøgu Jósefs og lív Jesusar.

### Jósef og Messias

Sum sonur hevði Jósef eina serstøðu hjá faðir sínum og frumburðarrætturin, ið var høgt í metum í tátíðar mentan hoyrdi Jósefi til. Tann marglitti fótsíði kyrtilin (dreymakotið) staðfesti hesa serstøðu.

Í kristnu læruni er Kristus frumborni Sonur Guds - klæddur í dýrd og tign áðrenn heimurin varð grundaður. (Kol. 1,15 og Jóh. 17,5)

Jákup sendi son sín Jósef til brøður hansara at vita um teimum visti væl við.

Inkarnatiónin (Gud bleiv menniskjað) er hjartað í tí kristna boðskapinum. Gud sendi son sín føddan av kvinnu, og sonurin kom til sína egnu ætt.

Jósef fekk kaldliga móttøku vegna dreymar hansara. Í dreymi hevði hann sæð, at sól, máni og ellivu stjørnur nigu fyri honum. Og á akrinum hevði hann í dreymi sæð, at bundi hansara reisti seg samstundis sum bundini hjá brøðrunum boygdu seg fyri bundi Jósefs. Bundi Jósefs á akrinum bar boð um eina jørðiska konga- og høvdingastøðu, men sól, máni og stjørnur bóru boð um eina hægri tign - ein tign sum kom omanífrá. Dreymar Jósefs minna á orð Messiasar: Mær er givið alt vald í himli og á jørð.

Jósef varð dømdur til deyða av sínum egnu brøðrum, men í staðin fyri at taka hann av døgum varð hann seldur og latin fremmandum. Ein av teimum 12 Juda, seldi Jósef fyri 20 silvurpeningar. Ein av teimum 12 Judas seldi Messias fyri 30 silvurpeningar, og Messias upplivdi eins og Jósef fyrst at verða dømdur av sínum egnu (jødiska ráðið) fyri síðani at verða givin upp til heidningar - rómverska landshøvdingan Pontius Pilatus.

Jósef fann náði í Egyptalandi, men eftir svik og rangar ákærur varð sakleysi hebrearin eisini dømdur av teimum fremmandu og tveittur í fangahús í Egyptalandi. Hóast Pilatus onga skuld fann hjá Messiasi varð hann kortini dømdur til deyðan. Fangahúsið í Egyptalandi er ein mynd av líðingum og deyða Messiasar. Tveir menn eru nevndir sum líða somu revsing sum Jósef. Bakarin og skeinkjarin hjá Farao. Annar fann náði og hin ikki. Tá Messias varð roknaður millum brotsmenn, liðu tveir aðrir somu revsing samstundis, annar fann náði og hin ikki.

Eftir at Jósef varð seldur til Egyptalands ráddi armóð og neyð heima hjá faðirinum Jákupi og brøðrum Jósefs. Juda rýmdi frá brøðrum sínum og gevur hetta okkum ábendingar um eina spjadda ætt. Søgan hjá jødiska fólkinum síðani teir vrakaðu Messias er ein drúgv sorgar- og líðingarsøga um eitt fólk, spjatt millum øll heimsins fólkasløg.

### Frá krossi til krúnu

Kongur Egyptalands fekk ikki frið í sinni vegna plágandi dreymar. Eftir einum degi er hebrearin Jósef leyslatin og hann er tann einasti í Egyptalandi ið kann geva Farao frið í sinni. Jósef sigur egyptum hvat framtíðin fer at bera, hann verður settur yvir alt Egyptaland og egyptar róptu "abrek" undan Jósefi. "Abrek" merkir "boyggi knø". Men egna ætt hansara livdi í vannkunnleika. Tey trúðu at Jósef var deyður, samstundis sum heidningar kundu njóta gott av dygdum Jósefs.

At Jósef stígur út úr fongslinum er ein mynd av tí kristnu vónini - uppreisnin. Hóast Kristus hevur verið ærdur og tilbiðin av heidningum í 2000 ár sum hin upprisni Messias, so hevur jødiska fólkið sum fostraði Kristus sum heild, livað í andaligum myrkri.

Í Egyptalandi fekk Jósef navnið Zafenat Panea sum merkir frelsari landsins. Tað er óneyðugt at gera viðmerkingar til messianska virðið í hesum heiti.

Jósef fekk í Egyptalandi konu ið nevndist Asenat og við henni fekk hann synirnar Efraim og Manasse. Í kristna boðskapinum verður tosað um at heidningar eru børn Guds í trúnni. Og Messias hevur vunnið sær eina brúður millum heidningar.

Men hungursneyðin var svár í Kánanslandi og neyðin dreiv ætt Jósefs til Egyptalands, har Jósef aðru ferð varð kendur av brøðrum sínum. Jødiska tjóðin kendi ikki Kristus tá teir møttu honum fyrru ferð.

Tá brøður Jósefs komu aðru fer at keypa korn, er hugburðurin og sinnið øðrvísi enn tá teir seldu Jósef. Jósef segði brøðrum sínum hvør hann var, og ættin varð seinni savnað í Gosen ið merkir sólskinslandið og er ein mynd av friðarríki Messiasar. At jødar í dag viðurkenna Kristus sum Messias í størri mun enn áður er ein sannroynd. Men hetta koma vit at síggja meira til í framtíðini. Gud hevur ikki vrakað fólk sítt, sum hann kendi frammanundan. Róm. 11,2.

Niðurstøðan er greið: Allir týðandi sannleikar í tí kristna boðskapinum eru fjaldir í lívssøgu Jósefs.

"Eg blunaði...." sungu tey vakurt um dreymar Jósefs í Norðurlandahúsinum.

Lat okkum eisini hava í huga, at søgan um Jósef er profetisk og er tí annað og meira enn dreymar.

Løgtingsformaðurin:

# – Nógv at gera í Tinginum um dagarnar

**Nógv týðandi mál eru á skránni í Løgtinginum, áðrenn tað fer heim um fáar vikur. Edmund Joensen, løgtingsformaður, sigur at tað verður koyrt út í eitt, inntil øll framløgdu málini eru avgreidd. Í løtuni eru 67 tingmál á skránni, harímillum løgtingslóg um annað útbjóðingarumfar og fíggjarlóg fyri 2004**

LÓGARVERK
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*




*Edmund Joensen, løgtingsformaður, sigur um løgtingsarbeiðið í hesum døgum, at nógv trýst er á, tí fíggjarlógin 2004 skal samtykkjast, og onnur týðandi mál skulu fáast ígjøgnum, áðrenn Tingið fer til hús miðskeiðis á mai mánaði*

– Fíggjarlógin skal helst samtykkjast innan fáar vikur, og nú skal hon so í fíggjarnevndina. Eg vóni, at tað fer at ganga væl, tí árið er so nógv útliðið, og tískil er tað átroðkandi at fáa eina nýggja fíggjarlóg skjótast gjørligt, sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður.

Bárður Nielsen framlegði tann 25.mars uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2004. Fyrsta viðgerð av fíggjarlógini var tann 30. mars, og sum skilst verður arbeiðið við fíggjarlógini liðugt, tá vit eru komin inn á mai mánað.

Eitt annað átroðkandi mál er uppskot til løgtingslóg um annað útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum. Tað er Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sum hevur lagt uppskotið fyri Løgtingið, og tað gjørdi hann tann 14.apríl. Málið hevur ikki verið til fyrstu viðgerð enn, men løgtingsformaðurin sigur, at hetta verður helst fyrst í komandi viku.

Eitt annað mál av týdningi fyri føroyingar er uppskot til samtyktar um at heimila Fíggingargrunninum frá 1992 at broyta ognarviðurskiftini í Føroya Banka. Føroya Landsstýri hevur ítøkiligar ætlanir um at broyta ognarviðurskiftini í Føroya Banka soleiðis, at Fíggingargrunnurin fær heimild at selja upp til 20% av Føroya Banka. Tað er Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, sum hevur lagt uppskotið fram, og fyrsta viðgerð var tann 2. apríl. Málið er nú beint í fíggjarnevnd Løgtingsins, har Anfinn Kallsberg er formaður. Tað er enn ógreitt, nær endalig at-kvøðugreiðsla verður í Løgtinginum.

Tað var gamalt, at Løgtingið fór til hús á flaggdegnum, men tað røkist onki fyri, at soleiðis verður í ár.

– Tað kemur alt í senn, so tað er nógv at gera. Men tað hevur gingið væl við málsviðgerðunum, ongin stígur hevur verið í, so eg vænti, at løgtingsmanningin kann halda summafrí, tá komið er eitt sindur inn í mai mánað, sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður.

*Framhald av síðu 10*

• ***Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 15 tons 31% 34,5% 11,5% 0,5%***

• ***Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 tons 20% 23,5% 6%***

• ***Bólkur 6: Onnur 1% 2% 0,5% 0,5%***

Ein fyrimyndarlig skipan: Verandi lóg er ein fyrimyndarlig skipan. Hetta er sjálvandi treytað av at tað verður umsitið samsvarandi andanum í lógini.

Síðani Heilárs økisfriðingarnar og lógin »um vinnuligan fiskiskap« komu í gildi fyri 10 árum síðani, hevur tað gingist væl við fiskarskapinum á Føroya grunninum. Tí kann tað **ikki** verða nøkur skilagóð loysn at tosa um eina nýggja skipan í dag.

Tað at politikkara í dag eru farnir at tosa um at gera eina nýggja skipan við fiskidagabanka, kunnu vit takka teimun fyri, sum hava umsitið lógina til egnan fyrimun. Har ikki øll hava veri líka fyri lógini. Vit eiga heldur at gera verandi lóg meira ítøkiliga.

Heimasíða mín: http://heima.olivant.fo/~hoyh/